VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Sambandið og skatturin

Í kjalarvørrinum av løgmansrøðuni og viðgerðini av henni hevur nógv verið tosað og skrivað um skattapolitikk og fíggjarpolitikk. Orsøkin er tann, at nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur tosað og skrivað um broytingar í skattapolitikkinum og fíggjarpolitikkinum.
Tað seinna sigur hann fer at síggjast aftur í fíggjarlógaruppskotinum, sum um ein stóran mánað fer at verða lagt fyri tingið sum grundarlag fyri fíggjarlógarviðgerðini, sum tingið fer at hava síðsta fjórðingsárið, og sum tríggjar vikur undan løgtingsvalinum skal enda við, at Løgtingið samtykkir fíggjarlógina fyri 2008.
Tað fyrra er tengt at tí seinna. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin, at broytingarnar ikki skulu ávirka samlaðu ætlaðu inntøkurnar, men at ein partur av skattinum skal flytast frá lægstu og til hægstu inntøkurnar.
Sambært fíggjarmálaráðharranum arbeiðir umsitingin við hesum seinna, meðan hon arbeiðir við figgjarlógaruppskotinum.
Henda vikan hevur vist, at tað onkra staðni er stórur leki. Hetta er óheppið. Veljarin trívist best, tá ið viðurskiftini eru gjøgnumskygd. Ikki minst, tá ið tað snýr seg um skattatrýst og harvið fyritreytina fyri skattagjaldi og tískil tøkum pengum, er tað sera týdningarmikið, at tað ber til at disponera.
Einasti flokkur, sum hevur boðað frá, at hann tekur undir við fíggjarmálaráðharranum, er størsti andstøðuflokkurin, sum inniliga heitir á landsstýrismannin um at gera tað, sum hann ætlar, og ikki at lata seg draga upp á tráð av sínum egnu!
Allir samgonguflokkarnir siga, at teir halda seg til skattapolitikkin í samgonguskjalinum, og í fíggjarpolitikkinum biðja teir fíggjarmálaráðharran um at brúka spariknívin í rakstrinum soleiðis, sum tað varð avtalað á samgongufundi í síðstu viku.
Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin hava hug at harta fíggjarmálaráðharran. Formaðurin í hansara egna flokki sigur seg ikki síggja meldingarnar sum trupulleika. Heldur sum spennandi ballónir og signal.
Fyri veljaran kennist hetta ørkymlandi.
Spurningurin er, hvat tað er, sum gongur fyri seg. Fyri fýra árum síðani var nógvur roykur um skattapolitikkin hjá Sambandsflokkinum.
Veljarakanningar søgdu, at Sambandið fór at vinna valið, men óítøkiligi skattaroykurin var orsøkin til, at Sambandið ikki vann stórt.
Nú stundar aftur til val, og nú er aftur nógvur skattaroykur kring Sambandsflokkin. Fyri Sambandsflokkin, politisku skipanina og serliga fyri skattgjaldaran og veljaran hevur tað stóran týdning, at tað er púra greitt, hvat er og verður galdandi á hesum økjum.
Sambandsflokkurin eigur at siga, um hann er innanhýsis samdur, um hann er samdur við sínar samgonguflokkar, ella um hann er á veg at mynda skattapolitikk saman við andstøðuni.

Sosialurin

Føroyska sendistovuumboðanin

Fyrisspurningur til Søren Christensen,ríkisumboðsmann, um føroysku sendistovuumboðanina samsvarandi felagslýsingini undirritað í Fámjin 29. mars 2005

TÓRBJØRN JACOBSEN
tingmaður

Fyrispurningur

Hevur Jóannes Eliasen skilt og endurgivið rætt úr ”Administrativ Samarbejdsaftale” í lesarabrævi í Dimmalætting hin 24. juli 2007, ella hevur hann púra misskilt alt tað, sum hann endurgevur ?

Verða føroyingarnir, sum virka á donsku sendistovunum, mettir sum sjálvstøðugur partur av sendistovuni, ella verða teir mettir ájavnt við danska ambassadukorpsið, og eru teir undir stjórn og ræði hjá danska ambassadørinum, og harvið danska uttanríkisráðnum, í hvørjum einstøkum føri ?

Er danska sjónarmiðið, at føroysku starvsfólkini eru fullgyldugur partur av danska starvsliðnum, soleiðis at skilja, at uttanríkisráðið lutfalsliga hevur minkað um sínar starvsetanir og harvið sínar útreiðslur í mun til ekspansiónina í føroyska partinum av korpsinum ?

Ber tað til hjá heimastýrisstjórn sum tí føroysku, at vera fullgylduga og formelt umboðandi á ambassadu niveau, og er føroyska skeltingin og flaggingin annað enn ein gestus, eitt politiskt og praktiskt góðtikið appendix, afturat tí ráðandi og stjórnandi donsku skeltingini og flaggingini, og kann orðingin um at starvsfólk verða send út á ”Kongerigets Danmarks udenrigsrepræsentationer til varetagelse af Færøernes interesser” skiljast øðrvísi, enn at so er, og hvat merkir orðingin, at føroyska umboðanin ”markeres på passende vis med skiltning, flagning m.m. ?

Anfinn Kallsberg staðfestir í samrøðu við Dimmalætting, at arbeiðsgevarin hjá føroysku sendiharrunum er uttanlandsdeildin í Tinganesi. Hvussu hongur hendan útsøgnin saman við felagslýsingini, harið skrivað stendur: ”At tey útsendu starvsfólkini skula fylgja donsku reglugerðini ”Instruks for Udenrigstjenesten” og eru hesum viðvíkjandi undirløgd leiðaranum á donsku sendistovuni (les: danska ambassadørinum) ?

Í sama viðfangi verður skrivað, at tey útsendu starvsfólkini skulu ganga undir ta fyrisitingarligu reglugerðina hjá donsku uttanríkistænastuni. Tað tykist sum kommandovegirnir eru ógreiðir, um hald er í tí uppáhaldi, at føroysku starvsfólkini virka beinleiðis undir uttanlandsdeildini í Tinganesi og harvið løgmanni ?

Hvussu verða tey fíggjarligu viðurskiftini greidd. Hevur føroyski parturin av donsku sendistovunum sín egna fíggjarcyklus, sín egna kassa, ella verður fyrst avroknað ímillum Føroya Landsstýrið og Danska Uttanríkisráðið, sum síðani tekur sær av lønarflytingum og útreiðslum annars, sum standast av hesi umboðan ?

Táið skrivað verður í grein 2 stk. 2, at ”Den stedlige repræsentationschef kan sikre, at Kongeriget Danmarks samlede interesser ikke tilsidesættes”, hvussu skal hetta tá skiljast. Standa føroysk og donsk áhugamál upp ímóti hvørøðrum, hvørjar eru tá Kongeriget Danmarks samlede interesser ?

Hvør er munurin í diplomatstatus hjá føroysku sendistovufólkunum í Reykjavík - í mun til starvsfólkini í Brússel og London ?

Er ráðandi hugsanin í donsku uttanríkistænastuni onnur enn hon, at føroysku umboðini eru heilur partur av donsku umboðanini, munurin sum er íkomin er bara, at føroyska heimastýrisstjórnin er farin undir at fíggja ein part av danska ambassadukorpsinum, og hevði tað undir verandi politisku viðurskiftum landanna millum, latið seg gjørt, at føroyska heimastýrisstjórnin gjørdi líknandi ambassaduvtalu við annan stat enn hin danska ?

Viðmerkingar:
29. mars 2005 skrivaðu løgmaður Føroya, Jóannes Eidesgaard og uttanríkisráðharri Danmarkar, Per Stig Møller undir eina ”Fælles principerklæring mellem Danmarks Regering og Færøernes Landsstyre om Færøernes medvirken og inddragelse i udenrigs- og sikkerhedspolitikken”. Felagslýsingin verður í dagligari talu rópt Fámjinsskjalið. Hendan sama dagin skrivaðu báðir partar undir tað, sum kallað verður ein ”Administrativ samarbejdsaftale.” Í øðrum parti: ”Samarbejde på repræsentationerne” er gjørd politisk sátt um, hvussu Føroyar kunna virka í sendistovuhøpi. Samstundis sum hetta er ein politisk viðurkenning av, at danir reka uttanríkispolitikk vegna Føroyar, eru ásetingar um, hvussu føroyingar kunna virka í tí harav fylgjandi diplomatiska rúminum, m.a. á donsku sendistovunum í øðrum londum.

Nakað fyri Ólavsvøku, 24. juli 2007, dittar ein leirvíkingur, Jóannes Eliasen, sær til at hava eina meining um hesi viðurskifti. Hetta átti ikki at verið nakar trupulleiki í landi, sum í hvussu er heldur seg hava knæsett talufrælsið. Præambulin í greinini er bein endurgeving úr samstarvssáttmálanum hjá Per Stig og Jóannesi frá 29. mars 2005. Eliasen skrivar um føroysku arbeiðstreytirnar á donsku sendistovunum:

starvsfólk verða send út á ”Kongeriget Danmarks udenrigsrepræsentationer til varetagelse af Færøernes interesser” á yvirtiknum málsøkjum.

tey útsendu starvsfólkini skulu ganga undir ta fyrisitingarligu reglugerðina hjá donsku uttanríkistænastuni.

tey útsendu starvsfólkini skulu fylgja donsku reglugerðini ”Instruks for Udenrigstjenesten” og eru hesum viðvíkjandi undirløgd leiðaranum á donsku sendistovunum (les: danska ambassadørinum.)

á ikki yvirtiknum málsøkjum verða tey útsendu starsfólkini kunnað um sendistovunar arbeiði.

á yvirtiknum málsøkjum arbeiða tey útsendu starvsfólkini eftir boðum frá Løgmansskrivstovuni.

tey útsendu starvsfólkini senda í egnum navni sínar

Framhald á síðu 13

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.